

# Føroysk oljuráðstevna á Borgini: Hvat um vit finna olju

Jan Müller

28.01.2014 - 16:01

Oljan.fo

Hvussu skulu Føroyar skipa seg í mun til vinnuligu avbjóðingarnar, útlendska arbeiðsmegi, ójavnt lønarlag, stættarmun og øðrum samfelagsligum árinum, ið kunnu standast av einari oljuvinnu?

Hvat sigur vinnan, fakfelagið, politikarin og serfrøðingurin?

Hetta eru spurningar, sum verða reistir á tiltaki í Fólkatingimnum 21. februar.

Tiltakið verður ein røð av stuttum framløgum sæð frá ymiskum sjónarmiðum í Føroyum. Fyrsta framløgan verður við umboð frá norska oljumálaráðnum, sum fer at greiða frá skipanini í Noregi.

**Tiltakið er ókeypis**. Tilmelding fer fram við at senda navn og bústað til jf@ft.dk í seinasta lagi 19. februar. Tað er Javnaðarflokkurin við Sjúrð Skaale, fólkatingsmanni á Fólkatingi, sum skipar fyri. Pláss er fyri 150 luttakarunum. Tilfarið verður í Fællessalen og byrjar skrásetingin kl. 12.30. Sjálvt tiltakið byrjar kl. 13 og endar kl. 17.

Orðstýrari er Jón Brian Hvidtfeldt

Framløgufólk:

Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin

Árni Ólafsson, fyrrv. ráðgevi og samráðingarleiðari fyri Landsstýrið

Jan Müller, stjóri í Føroya Oljuídnaðarbólki (FOÍB)

Johan Dahl, vinnumálaráðharri

Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og fyrrv. landsstýrismaður í fíggjarmálum

Ole-Anders Lindseth, norska oljumálaráðið

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum

Torbjørn Jacobsen, havnarmeistari og fyrrv. landsstýrismaður í oljumálum